Fíggjarmálaráðið

# 2 fulltrúar til Fíggjarmálaráðið

**Søkt verður eftir tveimum fulltrúum til Fíggjarmálaráðið, har tað eina starvið er tíðaravmarkað til 9 mánaðir fyri fulltrúa í barsilsfarloyvi**

**Størvini**
Fulltrúar í Fíggjarmálaráðnum arbeiða við einum fjølbroyttum úrvali av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

**Til dømis:**
- At ráðgeva landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og at viðgerða innkomin mál
- At fyrireika uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- At loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- At gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- At ráðgeva og leiðbeina aðalráðum og stovnum.

**Førleikar**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving sum búskaparfrøðingar og duga at arbeiða sjálvstøðugt við góðum samstarvsevnum við onnur.

**Vit bjóða**
- Sjálvstøðugt starv
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving
- Eitt starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Flex-tíð

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Freistin at søkja er 14. mars 2011 kl. 12.00. Størvini verða sett skjótast skjótast tilber, tíðaravmarkaða starvið verður tó sett frá 1. apríl 2011 at rokna.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmála-stjóra, á tlf. 35 20 20.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo. Teldupostadressan er fmr@fmr.fo

TRAÐAGØTA 39 · POSTSMOGA 2039 · FO-165 ARGIR · TEL: 35 20 20 · FAX: 35 20 25 · FMR@FMR.FO

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

## Psykiatriski Depilin bjóðar:

# Grundskeið í DAT

DAT (DBT á enskum), dialektisk atferðarterapi, er eitt viðgerðartilboð, sum primert verður veitt fólki, ið hava diagnosuna "Kensluliga Òstøðugt Persónleikaólag" (borderline). Tað er ein struktureraður viðgerðarháttur, sum hevur sín uppruna í USA. Marsha M. Linehan, professari í sálarfrøði, hevur útviklað henda viðgerðarhátt, sum er nýttur við sera góðum úrslitum . Í norðurlondum er tað Svøríki, sum hevur verið á odda við hesi viðgerð, og Danmark er komið við fyri nøkrum árum síðani. Ì Føroyum byrjaði Psykiatriski Depilin við DAT í 2008, og er hetta fyrstu ferð, at eitt tílíkt skeið verður hildið her. Tað er eitt 4-daga skeið.

**Endamál:** At menna DAT í Føroyum.

**Málbólkur:** Tey, ið hava áhuga í ella arbeiða við fólki, sum hava nevnda trupulleika.

**Hvar:** Veitlsuhøllin á Lansdsjúkrahúsinum

**Nær:** Í viku 15, mánadag 11. til hósdag 14. apríl 2011, kl. 8-16. Aftrat hesum kemur heimaarbeiði og venjingar.

**Luttakaratal:** Tað er pláss fyri 30 luttakarum. Gott er, um tvey ella fleiri eru frá sama arbeiðsplássi, tí viðgerðin leggur upp til toymisarbeiði.

**Forkunnleiki:** Fyrimunur er at lesa Manual til dialektisk adfærdsterapi – færdighedstræning (Marsha M. Linehan), tó fara luttakararnir at fáa eina mappu við tilfari úr hesi bók. Grundbog i dialektisk adfærdsterapi (A. Kåver og Å. Nilsonne) er eisini viðkomandi.

**Ábyrgd fyri skeiðnum:** Psykiatriski Depilin, Landsjúkrahúsið, Tórshavn.

**Undirvísari:** Stig Helweg Jørgensen, danskur sálarfrøðingur og DAT terapeutur.

**Kostnaður:** 4900 kr. íroknað skeiðstilfar, morgunmatur og seinnapartskaffi. Møguleiki er at keypa døgurða á LS.

**Skeiðsprógv:** Verður handað, tá skeiðið endar.

**Tilmelding og nærri upplýsing:** Í seinasta lagi 21. mars hjá Elisabeth Guttesen, samskipara í DAT toyminum á Psyk. Deplinum, á teldupostadr.: lseligu@ls.fo

# Kølilast til sølu



| Nr: | Merki: | Nr. Pl. | Árgangur | Staður | Pll.: | Lastievni: | Totalvekt: |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| T200 | Schmitz | KB 206 | 2002 | Tvøroyri | 33 | 29.350 kg | 39.000 kg |

UM HÓSKANDI BOÐ FÆST VERÐUR HENDAN KØLILASTIN HERVIÐ LÝST TIL SØLU. FREISTIN AT KOMA VIÐ TILBOÐUM ER 15. MARS 2011. KUNNING UM LASTINA FÆST VIÐ AT VENDA SÆR TIL JENS PETUR BRATTALÍÐ, FERÐSLUSAMSKIPARA, Á TLF NR 293083 ELLA Á JPB@SSL.FO

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Útbjóðing: Ítróttahøll í Tórshavn

Vegna Neistan verður arbeiðið at byggja nýggja ítróttahøll við Landavegin í Tórshavn boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið verður boðið út sum høvuðsarbeiðstøka. Útbjóðingartilfarið, sum alt er talgilt, kann bíleggjast hjá KONTRAST frá mánadegnum 7. mars 2011. Kostnaður fyri tilfarið er 500 kr.

Umsókn um tilfar verður send til teldupost: kari@kontrast.fo tel.+298 212223. Upplýsingar um virki, bústað, vinnutal, ábyrgdarpersón, t-postadressu og telefonnr. skal upplýsast.

Lisitatiónin verður á teknistovuni hjá **KONTRAST**, Grønlandsvegur 3, Tórshavn, mánadagin 4. apríl 2011 kl. 11.00.

KONTRAST
Postsmoga 226
Grønlandsvegur 3,
110 Tórshavn

GEVIÐ BLÓÐ